# FØÐINGARDAGSTILBOÐ

- klippið virðisseðlarnar út og latið teir inn í nevndu handlar
- galdandi frá týsdegnum 4. til leygardagin 8. november,
3-arin tó bert týsdagin og mikudagin

VIRÐISSEÐIL
Joggingjakkar í fleiri ymiskum litum kr. 299,95. Við at lata virðisseðilin inn, fært tú 26% í avsláttri. Avmarkað nøgd.
**-26% av joggingjakka**
Deres
klipp seðilin út

VIRÐISSEÐIL
T-Shirts, vanl. prísur kr. 149,-. Við at lata virðisseðilin inn, fært tú kr. 49,- í avsláttri. Avmarkað nøgd.
**Frítt val 100,-**
SKÁLKUR
klipp seðilin út

VIRÐISSEÐIL
Stóra føðingardagskappingin í SMS
Við at lata virðisseðilin inn, fært tú henda kikaran fyri einans kr. 125,- Avmarkað nøgd.
**Lítil kikari 8x2,** Fyrr 177,-
**Nú 125,-**
SKILLING
klipp seðilin út

VIRÐISSEÐIL
Body Scrub 200 ml., ymisk sløg, t.d. Papaya, Mango, og Coconut, vanligur prísur kr. 145,-. Spar kr. 40,- við at lata seðilin inn.
**Body Scrub 105,-**
THE BODY SHOP
klipp seðilin út

VIRÐISSEÐIL
Við at lata virðisseðilin inn, fært tú 20% í avsláttri av øllum tógvi. Avmarkað nøgd.
**Alt tógv -20%**
BINDIBÚÐIN
klipp seðilin út

VIRÐISSEÐIL
Stóra føðingardagskappingin í SMS
Eygnaskuggar, nógvir ymiskir litir. Vanligur prísur kr. 80,- Spar kr. 21,- við at lata seðilin inn.
**Eygnaskuggar 59,-**
THE BODY SHOP
klipp seðilin út

VIRÐISSEÐIL
Við at lata virðisseðilin inn, fært tú 20% í avsláttri av øllum troyggjum. Avmarkað nøgd.
**Allar troyggjur -20%**
BINDIBÚÐIN
klipp seðilin út

VIRÐISSEÐIL
Tað besta av tí besta. Kodak Royal framkalling -50% og framkalling av digitalum myndum bert kr. 2,- pr. stk (við innlating á kort ella fløgu).
**Tilboðið er berta galdandi týsdagin 4. og mikudagin 5. november.**
**Kodak Royal framkalling -50%**
**og framkalling av digitalum myndum: kr. 2,- pr. stk**
3arin
klipp seðilin út










## frá mótasýningini í sms



sms 26 ár

## mong vitjandi fyrstu vikuna

Sunnudagin 2. november fylti SMS 26 ár. Men føðingardagurin varir í 12 dagar! Longu týsdagin 28. oktober varð byrjað við minigolf á Torginum, og væl varð vitjað.

Ung og gomul hugnaðu sær teir báðar dagarnar, golfbreytirnar vóru á Torginum. Golfbreytirnar eru aftur á Torginum hósdagin og fríggjadagin í hesi vikuni. Opið er frá kl. 14 til 20 báðar dagarnar.

Mikudagin vitjaði strutsurin Carlos, og í ein tíma bjóðaði hann børnunum ókeypis ballónir. Og nógvar vórðu latnar; heilar 700 ballónir gav Carlos børnunum bara tann fyrsta dagin. Carlos fer at vitja í SMS aftur hósdagin og fríggjadagin í hesi vikuni; báðar dagarnar millum kl. 16.30 til 17.30.

Hóskvøldið var so stóra heystmótasýningin, sum Barbara í Gongini skipaði fyri, og hana ber til at lesa meira um aðrastaðni í blaðnum.

Tá føðingardagur er í SMS, eru tað tvey, sum eru rættiliga fastir gestir. Tað eru tey bæði Angela og klovnurin Hannibal. Tey vitjaðu fríggjadagin, og tað gjørdu teir tríggir Absalon, Niklái og Ásbjørn úr Glotta og Gleimi eisini. Nógv fólk vóru til sýningarnar hjá teimum, og børnini - og tey vaksnu - stuttleikaðu sær óført. Tit hava møguleikan at síggja tey framføra aftur í SMS, tí tey fara nevniliga aftur á pallin nú leygardagin.

Leygardagin 1. november, Allahalganna dag, var langur leygardagur í SMS - opið var heilt til kl 17.00. Har kundu føðingardagsgestirnir keypa inn aftur við hugnaligum klavertónleiki hjá Gunnari Guttesen og kórsangi hjá ungu dreingjunum í dreingjakórinum undir Brúnni. Eisini leygardagin vóru mong vitjandi í SMS, og tey fingu eisini eina góða og hugnaliga løtu.

Á sjálvum føðingardegnum, sunnudegnum 2. november, var Torgið karmur um forvitnisligt minitivoli-tiltak við dósa- og pílakasti, dino-rusjibana og karussell. Øll hesi tiltøk vóru ókeypis, bert tú hevði virðisseðilin í SMS blaðnum við tær. Umframt ókeypis tiltøkini var søla av kandy-floss og poppkorni, umframt bamsutombola. Ágóðin av bamsutombolanum fer til arbeiðið hjá ÍSB. Minitivolitiltakið hevur opið í dag og morgin afturat frá kl. 14 til 20.











